## Benjamin við nýggjari fløgu – Benjamin

Benjamin er heitið á fyrstu fløguni, sum ungi gøtumaðurin, Benjamin Petersen kemur út við í hesum døgum. Tað er plátufelagið Tutl, sum gevur fløguna út, og hon væntast á gøtuni í morgin. Benjamin sigur við Rás 2, at hann fyri tveimum árum síðani setti sær fyri, at hann skuldi geva eina fløgu út, áðrenn hann bleiv 20 ár. Benjamin hevur fingið hjálp frá einum øðrum gøtufólki, Eivør, sum syngur við á tveimum løgum. Tónleikurin á fløguni er jazzkendur tónleikur – og tí, sum Benjamin segði, at allir ordiligir tónleikarar hava roynt seg sum jazztónleikarar fyrst. Níggju løg eru á fløguni, og hvøi verður at hoyra tey á útgávukonsert í Losjuni í Gøtu langafríggjadag kl 20 og í Staðnum í Vestmanna 3. apríl. Seinni er ætlanin eisini at hava konsert í Norðurlandahúsinum.



# Orsøkin til lekar finnast

**Barnagarðurin í Nólsoy er nú eitt ára gamal, og umboð frá kommununi hava verið og kannað bygningin í sambandi við eitt ára garantiið. Millum annað skulu fleiri lekar lokaliserast**

BYGGIGARANTI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Snøggur sær hann út, og hann var eisini mettur at vera eitt valaverk, tá hann stóð liðugur fyri einum ári síðani.

Látrið eitur barnagarðurin í Nólsoy, og hann hýsir bæði vøggustovu- og barnagarðsbørnum, umframt frítíðarskúla.

Stovnurin er nomineraður til 42 børn, og frá 1. apríl verða tey níggju í vøggustovu, 17 í barnagarðinum og tíggju í frítíðarskúlanum, sum í Nólsoy umfatar børn upp til tíggju ára aldur, í mun til 1. og 2. flokk í Havn.

Enn eru nakrir manglar við bygninginum. Eitt nú er spæliplássið ikki fullfíggjað enn, brandtrappan vantar, og so hava tey havt rættiliga stórar trupulleikar við lekum.

- Teir eru í løtuni við at finna út av, hvar lekarnir stava frá. Okkurt er okkara egna skuld, tí vit hava ikki givið okkum nóg nógv far um at lata hurðarnar ordiliga aftur. Hurðarnar eru av tí slagnum, har tú skal trýsta hondtakið upp, fyri at hurðarnar skulu fara ordiliga í lás, og verður tað ikki gjørt, legst skittur ímillum listarnar sum ger, at vatnið rennur inn heldur enn út, sigur Guðrun S. Hansen, leiðari á stovninum.

Annars verður mett, at trupulleikin liggur í listunum rundan um hurðar og vindeygu, men tað er nakað, sum arbeitt verður við í løtuni.

Onnur viðurskifti eru heldur ikki so, sum starvsfólkið kundi hugsað sær.

- Hølini eru ógvuliga opin, og tað órógvar. Tað er eingin rættiligur friður nakrastaðni í barnagarðinum. Vit hava tólv úthurðar, men bara tvær innhurðar, so vit kundu hugsað okkum, at bygningurin var betri avskyldraður, sigur Guðrun S. Hansen.



*Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at ætlanin er at byggja spæliplássið liðugt út nú tað fer at vára*

### Manglar rættast

Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, sigur, at umsitingin hevur kunnað hann um støðuna í barnagarðinum í Nólsoy.

- Soleiðis sum eg skilji tað, er støðan ikki akutt. Sjálvandi skulu lekarnir tettast, og tað verður arbeitt við tí málinum í løtuni, sigur Heðin Mortensen.

Borgarstjórin sigur, at hann er vitandi um, at spæliplássið í barnagarðinum ikki er fult útbygt, men at tað ætlandi verður gjørt í vár.

- Vit plaga vanliga at gera slík arbeiðir, tá tað fer at vára, og tað verður eisini gjørt í barnagarðinum í Nólsoy, sigur Heðin Mortensen.

Viðvíkjandi vantandi brandtrappuni sigur borgarstjórin, at hann ikki var vitandi um hetta, men at slík lógarásett krøv sjálvandi skulu vera í lagi.

- At bygningurin innan er so opin er ein spurningur, har vigast má fyri og ímóti. Hugsanin við tí stóra opna rúminum var hon, at hølini kunnu nýtast til so nógv onnur tiltøk í bygdini enn einans at ansa børnum, og tað verður trupult, um hølini verða petta sundur í smærri rúm. Men sjálvandi eru fleiri møguleikar, til dømis við leysum veggum. Tað er nakað, sum leiðslan á stovninum og umsitingin í felag mugu finna út av, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

# Hetta má ikki henda aftur

**Áðrenn nakað verður gjørt við sparkivøllin í Nólsoy skal tryggjast, at fullgott grótkast og verjugarður verður bygdur, so brimið ikki skaðar vøllin aftur, sigur Heðin Mortensen**

BRIMVERJA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Tað var ein ljót sjón, ið møtti nólsoyingum, eftir ódnarveðrið 31. januar*
*Mynd: Nicolaj Falck*

Í skaðaódnini 31. januar í ár, stóð sparkivøllurin í Nólsoy fyri aðru ferð innan ein mánað fyri skotum.

Men meðan tað fyrru ferð var rímiliga lætt at reinsa vøllin aftur, var hesaferð tjúkt lag av runu omaná graslíkinum, eins og rættiliga stórir steinar sløgdust um allan vøllin.

Tað tók sum vera man fleiri dagar at rudda vøllin fyri runu og steinar, men so mikið av runu var sokkin niður í graslíkið, at dreningin typtist.

Hetta hevur so ført við sær, at tá tað regnar, sivar regnvatnið ikki niður ígjøgnum, men liggur sum ein dammur omaná.

Ljóspunktið er kortini, at sjálvt grasteppið ikki hevur fingið skaða.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at nú skal vøllurin tryggjast, so slíkt ikki hendir aftur.

- Eg havi biðið umsitingina gjørt eitt uppskot um, hvussu vit verja vøllin, so runa og grót ikki eina aðu ferð skolar inn á vøllin. Og áðrenn hetta er tryggjað, verður einki gjørt við sjálvan vøllin, sigur Heðin Mortensen.

### Brimverja

Borgarstjórin sigur, at neyðugt verður við einari brimverju sum tryggjar, at brimið ikki brýtur inn á vøllin, og at tað ikki bert verður neyðugt við einum grótkasti við munandi størri gróti enn framman undan, men tað verður eisini neyðugt at stoypa ein verjugarð, í hvussu er eystantil fyri vøllin, so tað av sjógvi, sum brýtur ella oysir upp um grótkastið, í minst møguligan mun endar inni á vøllinum.

- Eg havi verið í samband við Idé Møblar, sum hava leverað vøllin, og neyðugt verður helst við serútbúnum fólki úr Danmark at hyggja nærri at vøllinum. Sum eg skilji hava teir serliga maskinur, sum kunnu reinsa vøllin í slíkum føri sum hesum, sigur Heðin Mortensen.

Borgarstjórin vísir á, at kommunan í nærmastu framtíð skal leggja nýggja kloakkskipan í Nólsoy, og at maskinur í tí sambandi skulu út í oynna.

Tað er ikki løgd nøkur beinleiðis tíðarætlan, men sum skilst er ætlanin at fáa hetta arbeiðið gjørt í vár og í summar.